LM-065/2023

FYLGISKJAL 4

Sólgerð Hjørleifsdóttir

Fra: Sverri Egholm <se@knassar.com>
Sendt: 11. december 2023 10:50
Til: Almanna- og mentamálaráðið
Emne: Knassar: Hoyringsskriv - Uppskot til Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um kringvarp
Vedhæftede filer: Hoyringsskriv í samband við broytingar í kringvarpslógini.pdf

Til rætta viðkomandi,

Viðheft er hoyringsskriv frá Knassum til broytingar í kringvarpslógini.

--

Vinarliga / Best Regards

Knassar
Sverri Egholm
se@knassar.com

Knassar office: (+298) 20 80 80
Fartelefon: (+298) 73 33 31

www.knassar.fo

LM-065/2023

Avtakið stuðulin til privatu miðlarnar

Vit blanda okkum sum heild ikki uppí hvussu landið rekur almenna miðilin, og vit hava ikki nakra meining um at kringvarpsgjaldið verður prístalsviðgjørt. Men vit halda ikki, at Kringvarpið ikki skal blanda seg uppí tey tingini sum privatu miðlarnir klára útmerkað. Heldur ikki skal tað vera loyvt hjá Kringvarpinum at selja lýsingar og sponsoravtalur.

Samstundis vilja vit heita á landsstýri og løgting at viðgera miðlastuðulin til privatu miðlarnar. Vit heita á tykkum um at avtaka miðlastuðulin.

Vit hava áður sagt alment, at tær tvær milliónirnar høvdu verið betri givnar við at hjálpt onkrum av gøtuni ella til bústaðir til onkran sum er í neyð.

Og vit halda tað sama í dag.

Tú fjernar initiativið hjá miðlunum at menna seg. Um miðlastuðulin ikki var, vórðu pengarnir komnir aðrastaðni frá.

Við stuðlinum tekur tú initiativið burtur. Tað eru ikki komnir fleiri miðlar síðani, og menningin í føroyska miðlaheiminum av teimum traditionellu miðlunum er bara minkað. Vit fara so langt sum at siga, at landið við Kringvarpinum og nú miðlastuðlinum hevur dripið privatu miðlarnar í Føroyum.

Vit mæla til, at miðlastuðilin verður avtikin, ongantíð ov skjótt, og at lýsingar og sponsoravtalur ikki verða loyvdar í Kringvarpinum. Eisini at Kringvarpið flytir sína orku burtur frá økjum, sum privatu miðlarnir klára at gera.

Hetta er fyri at tryggja, at vit í framtíðini hava grundarlag fyri privatum miðlum í Føroyum.

Hinvegin. Er tað blaðútgávu, sum landið ynskir at stuðla, eiga krøv at vera sett til hetta. Í so fall mæla vit til, at miðil sum móttekur blaðútgávustuðul ikki hevur annað virksemi enn blað, og t.d ikki hevur virksemi á netinum og harvið fær kappingarfyrimun við almennum pengum.

Knassar
Niklái Nysted, stjóri